








# 2010 Metal árið mikla

**Rasmus Rasmussen, Tutl**

2010 hevur, meir enn nakað annað ár áður, verið metal árið mikla hjá okkara plátufelagið Tutl. Eitt nú hevur groove-thrashmetal bólkurin SIC givið tvær fløgur út. Fyrst eina fína live-fløgu við heitið: "Si Vis Pacem - Para Bellum", og seinni kom so høvðusverkið: "Fighters They Bleed", upptikin og ljóðblandað av teimum fremstu innan tunga metal heimin í Danmark, og er ljóðið í serflokki má sigast.

Melodiski og progressivi metal bólkurin Synarchy lat úr hondum sína væleydnaðu frumfløgu "Scars Of Gratitude", sum teir presenteraðu á turné í summar í útlondum í Evropa, umframt at teir hava verið ein tann virknasti konsert-bólkurin í Føroyum í ár.

Sangarin í Týr, Heri Joensen, má sigast at verða ein sera skapandi maður. Tí umframt at Napalm Records gjørdi "By The Light Of The Northern Star" fløguna út í fjør, so hevur Heri eisini fingið stundir til eitt síðu-project sum kom á marknaðin við fløgu í byrjanini av 2010. Her er talan um bólkin Heljareyga, sum umframt karimatiska Týr-frontmannin, er mannaður við ungum føroyskum talentum sum hava gjørt vart við seg á føroyska metal-pallinum seinastu árini. Heri fæst ikki við føroysk kvæði í Heljareyga, men skrivar hinvegin episkar føroyskar tekstir sum eru eitt sindur meira persónligir enn tað, hann syngur í Týr. Ein vøkur frumfløga og vónandi verður meira at hoyra frá Heljareyga, sum spældu sína fyrstu konsert í Føroyum fyrr í ár.

Jú nógv metal er givið út í Tutl í ár, og ballið steðgar ikki her. Umframt Skálmøld, so hevur føroyski doom-metal bólkurin Hamferð eisini givið sína fyrstu fløgu út í desember í ár. Hamferð hava hugtikið og tikið føroyingar í hópatalið á bóli við teirra dragandi doom-tónum, sum teir veruliga vunnu fram við í Sement-kappingini í byrjanini av 2010. Vinningurin var studiotíð í upptøkuhølinum hjá Terja í Nólsoy, og tað eru m.a. upptøkur hiðani, ið eru at finna á frumfløguni, ið ber heitið: "Vilst er síðsta fet", sum gittarleikarin í bólkinum, Theodor Kapnas, hevur framleitt og ljóðblandað.

Tutl gav fløguna út 14. desember og Hamferð fara á konsertferð fyrsta vikuskiftið í januar. Hvar og nær sæst her: www.myspace.com/hamferd

Um 2011 verður líka merkt av tungum metal-tónleiki sigur søgan lítið um enn. Men sikkurt og vist er at øll sløg av tónleiki fara at streyma inná á sandin í Tutl-aldum, og vit verða enn einaferð títt føroyska plátufelag við feskum útgávum alt árið.